

Mynd: Fuglø Arkitektar

# Klaksvíkin jólamiðdepil

**Gongur sum ætlað, verður Klaksvíkin í framtíðini jólamiðdepil í Føroyum**

JÓLABÝUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Saman við øðrum skapandi kreftum í Klaksvík, arbeiðir felagið IRIS í hesum døgum, við at gera eina almenna skrá fyri alt tað, sum skal henda í býnum í desember mánaða.

Talan er um eina skrá, sum bæði skal hýsa handilsligum, mentanarligum, ítróttarligum og andaligum tiltøkum. Meiningin er at fáa øll tiltøk í eina breiða og forvitnisliga felagsskrá, siga fyriskipararnir.

Fólkini aftanfyri IRIS hava í 12 ár skipað fyri, at Jólaskipið kemur siglandi inn eftir Klaksvíkini seinast í desember.

Í framtíðini er ætlanini at útbyggja hetta tiltak soleiðis, at Jólaskipið bert er ein partur av øðrum tiltøkum.

Ætlanin er at útbyggja skánna so mikið nógv komandi árini, at Klaksvíkin um nøkur fá ár, skal gerast ein jólamiðdepil í Føroyum.

Tað er ikki tørvur á hugskotum, men eyðsæð er tað, at ikki alt kann fara av bakkastokki fyrsta árið.

- Í ár gera vit eina skrá, sum skal útbyggjast so við og við. Ætlanin er, at fyrstu jólini eftir at samband er millum Klaksvíkina og meginlandið, skal Klaksvíkin verða ein hugnaligur og spennandi jólabýur.

Tá skulu vit kunna bjóða øllum føroyingum góðar upplivingar og tilboð, siga fyrirreikararnir í tíðindaskrivi.

Endaliga skráin fyri í ár verður lýst seinast í hesum mánaðnum.

### Jólaskipið fyrr í ár

Øll undanfarin ár er Jólaskipið komið á Klaksvíkina beint upp undir jólaaftan, men í ár verður tað øðrvísi. Um alt gongur eftir ætlan og veðrið verður til vildar, kemur Jólaskipið longu fríggjadagin 5. desember.

Ein orsøk til at vit hava lagt Jólaskipið júst henda dag, er, at sama dag hevur Handilsfelagið í Klaksvík "Open by night", siga fyrireikararnir.

Fleiri onnur spennandi tiltøk verða í desember frætta vit frá IRIS.

Feløg, handlar og felagsskapir, ið hava tiltøk, sum tey halda eiga at koma í hesa desember jólaskránna, kunnu venda sær til IRIS á tlf 456390 ella við at senda ein teldupost til iris@iris.fo

# Jólasølustevna í Klaksvík

**Jólasølustevnan í KÍ-høllini í Klaksvík verður í ár sera fjølbroytt við fleiri nýggjum framsýnarum. Eisini verða nógv tiltøk fyri børn á skránni, og sunnudagurin verður familjudagur burturav**

SØLUSTEVNA
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*
*Mynd: Norðlýsið*

Nú jólastákið av álvara er byrjað, skipar ein bólkur hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag fyri sermerktari og hugnaligari sølustevnu í KÍ- høllini.

At sølustevnan í ár verður sermerkt, sæst á luttakaralistanum, sum í mun til undanfarin ár er nakað broyttur.

Á sølustevnuni í ár, fara fleiri nýggir handlar sýna fram, og verður stutt sagt alt sum hugtekur føroyska húskið at síggja.

Umframt bilar, teldur, bøkur, leskidrikkir, undirhald, klæðir til hann og hennara, fer fyritøkan, Ansni, sum tekur sær av vaktarvirksemi at sýna fram trygdarskipanir, og Klaksvíkar Kommuna fer at kunna um kommunal viðurskifti.

### Øðrvísi enn undanfarin ár

Nakað sum eisini ger sølustevnuna 2003 sermerkta, er skipanin við døgunum, har fríggjakvøld verður serligt barna- og ungdómskvøld, har luttakarnir og fyriskiparnir leggja skránna og tilboðini eftir yngsta brúkaraskaranum.

Her verður eitt nú Look a like kapping, undirhald, mótasýningin við barna- og ungdómsklæðum. Eisini vitja búktalarin og gyklarin úr Glott & Gleimi.

Leygardagurin og kanska serliga leygarkvøldið er so sett av til ung og vaksin, har aldursmark verður ásett. Hetta kvøld verður okkurt eyka gjørt fyri at skapa sermerkta jólahugnan, sum øll kenna so væl úr KÍ- høllini tá sølustevna er.

Av tí at børn ikki alla tíðina renna runt, fáa tey vaksnu frið at tosa við framsýnarar, handilsfólk og koma hvørjum øðrum við.

Mótasýningin hetta kvøld verður skipað sum Gallasýning, og tónleikur verður á pallinum, og hvør veit, um ikki okkurt popplagið frá konsertini við landaplagunum verður framført.

Eisini verður eitthvørt forvitnisligt at frætta um 100 ára hópin hjá KÍ til komandi ár.

Hugnaliga KÍ Cafehornið ferð óivað at gera sítt til eitt gott ógloymandi kvøld.



### Familjudagur

Sunnudagurin verður skipaður sum familjudagur, har øll kunnu vitja, uttan mun til aldur. Finala verður í Look a like kappingini, hornjólatónleikur, KÍ- cheerleaders og hetta kvøldið fer KÍ at koma við avdúkingum í KÍ-tímanum.

Pallskráin er sum altíð sera forkunnug, har vit kunnu bjóða "Look a like"kapping, KÍ- Cheerleaders, heimsklassa undirhald við Glott & Gleimi, hugnaligan horntónleik, sang og guitarspæl, og sjálvandi hugtakandi mótasýningarnar øll trý kvøldini.

Allar dagarnar fara kendir rithøvundar, at vitja í høllini og koma har at signera teirra bókaútgávur.



*Klaksvíkin er nú av álvara farin undir miðbýarætlanina, sum í mong ár hevur bíðað á tekniborðinum. Á sølustevnuni í KÍ-høllini um vikuskiftið fáa fólk møguleikan at síggja nakrar av sepnnandi verkætlanunum, sum í løtuni verður arbeitt við*

*Skitsa: Fuglø Arkitektar*

# Klaksvíkar Kommuna á bási

**Millum framsýnararnar á sølustevnuni í KÍ-høllini í ár, verður Klaksvíkar Kommuna, sum fer at kunna borgararnar um nakrar av spennandi verkætlanunum, ið kommunan arbeiðir við í løtuni**

SØLUSTEVNA
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Klaksvíkar kommuna verður við á sølustevnuni, sum verður í KÍ-høllini um viskuskiftið.

Hetta er ein roynd hjá býráðsumsitingini á ein øðrvísi hátt enn higartil at kunna borgararnar um virksemi í kommununi.

Millum verkætlanirnar, sum verða sýndar fram á básinum hjá kommununi, verða vegaætlanin, miðbýarætlanin, økið kring gamla Kirkjugarð, ætlanin við gróttilfarinum úr Norðoyatunnlinum, Heilsumiðstøðin, Sambýlið á Heygnum, eldraíbúðirnar undir Kráarbrekku og umhvørvisætlan.

Eisini verða nøkur høvuðstøl úr fíggjarætlan býráðsins fyri 2004 løgd fram.

Tað er fyritøkan Vasti, sum tekur sær av at snið-geva básin, ið verður mannaður av starvsfólki hjá kommununi.



# Trúgvin skal út í gerandisdagin

**David Johannesen, prestur í Miðvági, hevur givið bók út, sum hann kallar »Lív hóast deyða«. Talan er um eina andaliga bók við stuttum lestrum til hvønn dag í árinum**

LESTRARBÓK
*Ingi Rasmussen*

– Vón mín er, at henda bókin gevur onkrum eitt troystarorð at hava við sær á lívsleiðini. Ætlanin við henni er, at hon skal lýsa bíbilska og lutherska prædiku, soleiðis sum vit hoyra hana í kirkjum okkara. Bókin byggir á kirkjunnar grund, og vónandi er hon kirkjufólkinum til hjálpar og signingar, sigur David Johannesen, prestur.

David Johannesen, sum er 54 ára gamal, hevur verið prestur í Vága prestagjaldi síðan 1977. Hann hevur áður givið fimm yrkingasøvn út og hevur skrivað tvær greinir í bókini »Martin Luther«, sum kom út í 1991. Nýggja bók hansara byggir eisini á Luthersku gudfrøðina. Jesus er miðdepilin og úr trúnni spretta lív og kærleiki.

– Henda bókin er um Harrans orð og lívið, trúnna og kærleikan. Kristinlívið er ikki bert eitt eiti, men skal verða livað í kærleika. Trúgvin skal út í gerandisdagin at liva! sigur David Johannesen.

# Fleiri streingir, ið tóna

**Sætta bindið í ritsavni Símunar av Skarði er útkomið. Í hesum bindinum eru tveir sjónleikir. Turið Sigurðardóttir leggur til rættis og setir leikirnar í ein bókmentaligan og søguligan samanhang**

RITSAVN
*Ingi Rasmussen*

Símun av Skarði stovnaði saman við Rasmusi Rasmussen Føroya Fólkaháskúla. Teimum tørvaði føroyskt tilfar til undirvísingina, og tí løgdu teir eisini mangt eftir seg. Símun av Skarði yrkti eisini tjóðsangin, og haðani er tittulin »Streingir, ið tóna« komin til ritsavn hansara. Í sætta bindi av ritsavni Símunar eru tveir sjónleikir.

Símun av Skarði skrivaði »Vár« um aldamótið 1900. Hann kom fyrstu ferð út í 1904, aðru ferð í 1960, tá ið Sigrið av Skarði gav hann út á forlagnum Ungu Føroyum. Hetta er sostatt triðja útgáva, og hon er prentað eftir aðru útgávu.

Víkingarnir á Helgolandi, sum Henrik Ibsen skrivaði í 1858, leyk Símun av Skarði við at týða í 1938. Hann hevði í 1928 týtt fyrsta tátt av leikinum, sum kom í Varðan tað árið til 100 ára minningarhátíð um Ibsen. Sigrið av Skarði Joensen gav leikin út í 1949 á forlagnum Ungu Føroyum. Hetta er onnur útgáva av honum.

# Føroymeistari í spei yrkir

**Tóroddur Poulsen er aftur á gøtuni við einum yrkingasavni, sum er tað nítjanda síðan Botnfall kom út í 1984**

YRKINGASAVN
*Ingi Rasmussen*

Føroyameistarin í spei, men eisini í rámandi poetiskum myndum, ger aftur vart við seg.

Soleiðis sigur Mentanargrunnur Studentafelagsins í sambandi við, at tey geva bók út við yrkingum eftir Tórodd Poulsen. Yrkingasavnið hevur heitið »Svøvnlendingur rættar kumpass«.

Eygleiðingar og yrkingar glíða inn í hvønn annan, soleiðis at heimurin verður orð. Ein longsul eftir heimbýnum fyri norðan hómast somuleiðis. Orðingar, sum innihalda sína egnu mótsøgn, umskiftist við staðfestingar, at yrkingin ikki er ein skøkja, sum krógvar seðlarnar millum bróstini, um nú skaparin skuldi kravt sítt.

Tosað verður um hús, sum einans kasta eysturvendan skugga og um oynna, har eingin vil búgva, fyrr enn alt er at fáa. Ungdómsins diskotek verða havd á máli og somuleiðis tey, sum gloyma bjargingarvestin eftur við hús.

Orðaheimurin hjá Tóroddi Poulsen er ein uppliving fyri fólk og fæ.

»Svøvnlendingur rættar kumpass« er løgd til rættis og prentað á Hestprent. Hon er 63 síður og kostar 120 krónur.



*Jólini eru bókatíð. Umleið 80 prosent av øllum bókum koma út um jóltíðir. Hesar fimm verða umrøddar á síðuni*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Flest lærarar á tingi

**Triðja bindið í bókaverkinum »Løgtingið 150« er útkomið. Í hesum bindinum verður serligur dentur lagdur á løgtingsval, valúrslit og leitorð til øll trý bindini**

LØGTINGIÐ 150
*Ingi Rasmussen*

Bøndurnir høvdu meiriluta í løgtinginum fyrstu tíðina eftir 1852, tá løgtingið varð endurreist. Seinni gerast keypmenn og aðrir vinnurekandi størsti bólkur í tinginum, og frá 1952 hava lærarar sitið í flest tingsessum.

Tilsamans hava 64 bøndur, 51 lærarar, 49 keypmenn og vinnurekandi og 38 sjómenn sitið á tingi, sæst millum annað í triðju bókini um løgtingssøguna, sum júst er útkomin.

Bókin snýr seg fyrst og fremst um hagtøl og valúrslit. Løgtingið hevur fingið loyvi frá Svend Thulesen at brúka tað tilfar, sum hann er komin til. Einar Waag gav í 1967 út bókina »Val og valtøl«, og í 1998 fór Svend Thulesen at arbeiða víðari við valtølum.

Jóannes Hansen, adjunktur, sum er kendur úr sjónvarpsstovuni valkvøldini, hevur tikið sær av at útvega persónligu atkvøðurnar frá 1940-2002 hjá teimum, sum vórðu vald, og teimum, sum komu inn sum varamenn. Hann skrivar um tey persónligu atkvøðutølini, um uppstilling, listaatkvøður og persónligar atkvøður. Um útrokningar av løgtingsvalinum í 1994. Og brot úr fyrstu gerðabókini í Norðstreymoy.

Finnbogi Ísakson, fyrrverandi løgtingsformaður, hevur skrivað inngangin, um tingmannatal og valrætt, um tingmenn 1852-2002 og flokkabýti 1906-2002 væl hjálptur av Pól á Kletti blaðmanni og um tingmenn eftir starvi.

Triðja bind í løgtingssøguni kostar 100 krónur.

# Álmanakkin trúgvastur á jólum

**Álmanakkin, álmanakkin, álmanakkin... So gjørdust aftur jól. Álmanakkin er útkomin fyri 76. ferð**

ÁLMANAKKI
*Ingi Rasmussen*

Eini jól uttan kava eru vit so von við. Men eini jól uttan Álmannakkan frá H.N. Jacobsens bókahandli eru næstan óhugsandi. Og so er hann enntá hvítur.

Álmannakkin er eitt sikkurt tekin um, at árið er farið at halla, og í Álmannakkanum 2004 er sum vænt nógv at finna um nýggja árið. Í fyrsta parti er sjálvur álmanakkin. Yvirlit yvir sól- og mánastøður í árinum og tað, sum vert er at vita um gongustjørnur og annað á himmalhválvinum í 2004.

Síðan koma nógv nýttu streymkurvarnar, talvan við vestfalskyrrindum og streymkort saman við lista yvir motorbátar undir 20 tons. Listin við skipum yvir 20 tons er aftur í ár prýddur við myndum av skipunum. Í hesum pørtunum eru sum vant nógvar aðrar hentar og dagførdar upplýsingar av alskyns slagi til sjóvinnuna.

Av nýggjum í ar eru upplýsingar um MRCC-sjóbjargingarstøðina og yvirlit yvir, hvussu farast skal fram, tá ið oljudálking kemur fyri á sjógvi ella landi.

Tilfarið um landbúnaðin, alivinnuna og oljuvinnuna er eisini dagført, og tað eru nógvu hentu upplýsingarnar aftast í álmanakkanum sjálvandi eisini.

Føroyski álmanakkin 2004 er 440 síður, og hann fæst bæði innbundin og heftur. Innbundin kostar Álmanakkin 180 krónur. Hefta útgávan fæst fyri 130 krónur.